


## Ársins mótmælisgonga: Svenning og Birgit av Lofti

Gloymið alt um ungdómsuppreisturin í 68, NATO-mótmælisgongurnar í sjeytiárunum og MTV-uppreisturin fyrst í nítiárunum. Seinast í apríl mánaði tóku hjúnini Birgit og Svenning av Lofti skelti í hond og gjørdu vart við sína ónøgd niðri í tinginum. Mannfjøldin var ikki tann størsta, men hjúnini bardust manniliga.



## Ársins krassj: Karsten Hansen

Sheriffurin, løgtingsmaðurin og fyrrverandi sýslumaðurin fær henda heiðurin. Karsten vónaði, at pínliga óhappið í november uttanfyri bakaríið hjá Frants, tá hann stoytti saman við Olafi Olsen, fór at fara stillisliga aftur við borðinum. Men bøðilin í SVF fekk frænir av tilburðinum, og so var fanin leysur í Vørðsluni. Skiparin á Norrønu er eisini ein kandidatur, men hann kundi ikki í sama mun dylja sína misgerð, tá hann mundi flutt Molan út á Argjalandi, tí at onkur hevði borið eyga við tilburðin frá landi.



## Ársins útiseti: Virgar Dalsgaard

Í harðari kapping við Reyða Ormin í London stendur eingin chefideologi sosialistanna kurl. Brølið úr Ringsted oysti sína vreiði yvir Føroya fólk stóran part av 2004, og eingin kundi kenna seg tryggan. Journalistar og tjóðveldisfólk fingu eina lortaspann fyri og aðra eftir oman yvir seg, tá Virgar tók penn í hond og revsaði nationalu massapsykosuna.

## Ársins ummælari: eingin

Dómsnevndin metti ikki, at nakar skikkaður kandidatur var til henda heiðurin í ár. Besta og einasta boðið var Carl Johan Jensen, sum trúfastur og ótroyttiligur hevur sáplað alt og øll niður í sand og øsku. Carl Johan fær hervið annað plássið, og vónandi fer onkur at ummæla okkurt í 2005…



## Ársins tár: Todi Jónsson

Í harðari kapping við Poul Mohr og Krúnprins Frederik kulmineraðu kenslurnar uppi á Hotel Føroyum í juni, tá Tude Jónsson boðaði frá, at hann aftur fór í føroysku landsliðstroyggjuna. Stóri spurningurin eftir tíðindafundin var, um tað var mansella kvinnulandsliðið, Todi skuldi umboða.

## Ársins virki: Smyril Line

Við pjøkanum á baki hava Óli Hammer og Klæmint Weihe gingið biddaragongd síðani stásiliga ferðamannaskipið lá sum tongul í brimi á Havnarvág. Felagið liggur við reyvini í vatnskorpuni, og leiðslan stendur í skrivandi stund við pumpurnar og selur út av sínum ognum fyri at bjarga Norrønu. Dómsnevndin var ikki á einum máli um ársins virki, tí fleiri alifyritøkur hava eisini givið Smyril Line skarpan gang.